## DAGSINS MEINING

# Fokus á vinnulívið

Vit hoyra javnan, at fjølmiðlarnir gera ov lítið burtur úr vinnulívinum, sum jú er ein av hornasteinunum í samfelagnum. Um so er ella ikki skulu vit ikki døma um. Men tað ber so altíð til at gera tingini uppaftur betri, og tað er so eitt mál, sum hetta blaðið hevur sett sær fyri, ikki minst nú okkara vinnulív í so mangar mátar er á einum vegamóti.

Hettta er ein tíð við stórum avbjóðingum, har vinnan er á einum vegamóti. Ikki bara sæð við vónloysis og negativum eygum, har bæði ali- og rækjuvinna eru í andaleypi, men har tað eisini er ljós fyri framman, m.a. tí tað her á landi finnast nógvar góðar kreftir, ið síggja nýggjar møguleikar og vilja royna teir, fólk við dirvi, treiksni og vissiónum.

Tí hóast bakkøst og ring útlit, so eru vit kortini so ómetaliga rík – menniskjansliga, samfelagsliga og tilfeingisliga. Tað ræður um at síggja hetta ríkidømi og troyta tað. Menningarstovan við tess vissionera stjóra hevur leingi víst á týdningin Føroyar kunnu hava sum tilfeingismiðdepil, ja sum ein flótandi oasa úti í Atlantshavi. Orð sum Northatlantic Ressourcesenter, Northatlantic Highway osfr. eru ikki tóm orð men hugtøk við veruligum innihaldi geva vit teimum gætur. Nú umheimurin sær, hvussu væl Føroyar liggja fyri sum umskipingarpláss hjá fiskivinnuni og sum goymslustað, fáa nógvar av spennandi verkætlanunum innihald og vind í seglini. Vit spreingja frystigoymslur inn í fjøll, vit menna móttøkurnar av fiski, vit luttaka á altjóða fiskivinnumessum osfr. Vit gerast meira og meira internationalt mindað. Um somu tíð sum vit fara út í heim við okkara vitan og vørum, kunnu vit vísa umheiminum á okkara egnu lítlu oasu úti í Atlantshavi, sum onnur kunnu brúka og troyta við fyrimunum.

Fyri ikki at tosa um,, biotøkni, Bitland og alla KT vinnuna. Eisini her liggja møguleikar. Men tað er umráðandi, at fokus verður sett á alt hetta, at tað verður upplýst um tað og at vit hava eitt framhaldandi, gevandi og kritiskt orðaskifti um alt hetta. At hetta er nakað, sum rørist í øllum samfelagnum. Umrøða av hesum kann vera við til at eggjan og menning men eisini til at forða fyri mistøkum. Sosialurin fer sum fjølmiðil so at gera eina roynd fyribils einaferð um mánaðin at seta meira fokus á vinnulívið, og vónandi verður hetta væl móttikið av okkara lesarum og samfelagnum annars. Vit leggja varisliga fyri í dag, har fokus verður sett á nýtt og spennandi vinnulívsprojekt í Fuglafirði, eitt av undangonguplássunum í føroyskum vinnulívi.

**Sosialurin**

# Havdálkingin skal steðgast beinan vegin

**John Johannessen**
*løgtingsmaður*



Tað er ein stór vanæra fyri Føroyar sum fiskivinnutjóð, at skipaflotin skal vera noyddur at dálka havumhvørvið orsakað av, at tað ikki skal bera til at sleppa av við burturkasti, tá komið verður til lands. Hendan dáklingin eigur at verða steðgað alt fyri eitt. Tí fari eg á næsta samgongufundi at heita á landsstýrismannin í umhvørvis- og kommunumálum, Jógvan við Keldu, um at taka álvarslig stig til at fáa skipaði viðurskifti á økinum beinan vegin.

Fiskur úr heimsins reinasta havi. Soleiðis siga vit, tá vit royna at selja fiskin á evropeiska meginlandinum, Hetta gera vit samstundis, sum føroyski skipaflotin - serliga fiskiskipaflotin - er noyddur at tveita stóran part av burturkasinum í havið, tí umstøður ikki eru at sleppa av við tað, tá komið verður til lands. Hetta er stór skomm og alla átalu vert.

Tað eru skelkandi tíðindi, sum útvarpið hevur borið seinastu tíðina úr nýggju spurnarkanningini hjá Gallup. Ein stórur partur av fiskiskipaflotanum brúkar havið sum ruskpláss. Bæði húsarhaldsburturkast og burturkast frá reiðskapi verða tveitt beint í havið. Ikki tí sjófólkið ynskir tað. Men tí, at umstøður ikki eru til annað.

**Her má vend koma í**
Føroyar hava eina álvarsama skyldu at taka ábyrgd fyri umhvørvinum. Tí er tað ógvuliga umráðandi, at vit fáa steðgað hesi óneyðugu dálking alt fyri eitt.

Tað eigur at vera eitt sjálvsagt lógarkrav, at burturkastið skal takast við til lands. Samstundis eigur tað at vera sjálvsagt lógarkrav, at kommunurnar skulu hava móttøkustøðir til burturkastið í øllum havnum og at so stórur partur av burturkastinum, sum gjørligt, verður brúktur til endurnýtslu.

Hetta eru ikki órímilig krøv. Men sjálvsøgd umhvørviskrøv til eitt land, sum livir av náttúrunar tilfeingi. Tì fari eg á næsta samgongufundi at heita á Jógvan við Keldu, landsstýrismann í umhvørvis- og kommunumálum, at taka neyðugu stigini at steðga dálkingini alt fyri eitt.

**Vestmanna er fyridømi**
Vestmanna hevur, sum fyrsta staðið í landinum, sjálvboðin tikið stig til at seta upp móttøkustøð til at taka ímóti burturkastinum frá skipum. Hetta eiga vestmenningar uppiborið rós fyri.

Samstundis hava vestmenningar eisini tikið stig til at seta á stovn eina lokal Agenda 21 skrivstovu í bygdini, fyri at styrkja lokalu umhvørvisverndina. Hetta má sigast vera eitt megnar framtak, tá hugsað verður um, at hvørki landsmyndugleikarnir ella kommunalu felagsskapirnir hava megnað at tikið hetta stigið, hóast tosað hevur verið um tað í fleiri ár.

Vestmenningar hava skilt, at tað er ein neyðug skylda at fara væl við umhvørvinum. Vónandi kunnu vestmenningar vera eitt gott fyridømi fyri aðrar kommunur eins og fyri landsmyndugleikarnar, tá tað um umhvørvi ræður.

# Reinari havumhvørvið og ein umhvørvisstova

**Heidi Petersen**
*løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokin*



Vestmanna kommuna hevur gingið á odda við at verja umhvørvið í og um bygdina. Við eldsálum sum Finnboga Joensen o.ø. er gróðursett viðarlund í bygdini. Grønur skúli er settur á stovn, barnaansingarstovnarnir eru vorðnir "grønir". Arbeiðið við at nýta sólarorku til upphitan av skúlanum, svimjihylinum og ítróttarhøllini er í gongd. Innsavnan av greinum og trøum úr gørðunum, og brúktum jólatrøum frá húsunum, er fingin at virka. Tveir skúlaflokkar rudda alt uttandura øki skúlans hvørja viku. Og kassar til sankutøð eru bæði í skúlanum og aðrastaðnis.

Alt hetta eru tiltøk, sum vit øll í felag kunnu gera, uttan tað stóra hóvastákið og við lítlari íløgu, men tað krevst at vit gerast tilvitað um umhvørvið og náttúruna rundanum okkum, og at onkur setur í gongd.

**Havumhvørvið**
Eg vil tó vísa á eitt, sum enn manglar, og er tað havumhvørvið.

Her eigur at skipast so fyri, at skip og bátar sleppa av við burturkast í øllum havnum í Føroyum.

Hetta kundi verið skipað á tann hátt, at havnaumsjónarmaðurin hevði bingjur á havnarlagnum, sum hann umsat soleiðis, at tá skip ella bátur hevði fyri neyðini at sleppa av við burturkast, fingu teir atgongd til bingjurnar móti ávísum gjaldi, ella kundi hesin kostnaðurin verðið lagdur omaná t.d. havnargjaldið. Álagt skuldi verið skipum og bátum at taka alt burturkast við sær til lands, so teir fylgdu regluni um at ikki er loyvt skipum ella bátum at koyra burturkast í havið, og ikki, sum tað verður gjørt í dag, har tað nógva verður blakað fyri borð. Nógv av tilfarinum, sum nýtt verður umborð á skipunum í dag, eru ymiskar olju/plast vørur sum ikki forganga, og tískil eru við til stóra dálking av okkara havumhvørvi.

**Umhvørvisstova og lokalagenda 21 felag í Vestmanna**
So niðurstøðan er greið, landsstýrið eigur at síggja til at ein skipaður umhvørvispolitikur fæst at virka fyri alt landið, sum eisini umfatar havumhvørvið. Hesin umhvørvispolitikur kann setast í verk við at ein umhvørvisstova verður sett á stovn, sum fær til uppgávu at seta í gongd umhvørvisvernd sum borgarin, kommunan, stovnar og vinnulív samstarva um, við Agenda 21 boðskapinum sum motto, hugsa globalt og handla lokalt.

Her er vert at gera vart við nýstovnaða lokalagenda 21 umhvørvisfelagið í Vestmanna, ið varð sett á stovn 14. mars, hvørs høvuðsuppgáva verður at gera umhvørvisátøk í Vestmanna kommunu saman við stovnum, feløgum og borgarunum í bygdini. Vónandi verður hetta felag fyridømi fyri aðrar kommunur í Føroyum, so borgararnir í økjunum kring alt landið, kunnu fáa íblástur og vegleiðing til eisini at gera síni egnu lokalagenda 21 feløg, við ST samtyktini frá Rio 1992 sum grundsjónarmiði, hugsa globalt og handla lokalt.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Fosturvatnskanningar – hvat vilja vit?

**-Eg elski at vera mongol, tí teir eru so fittir. Eg havi nógvar góðar vinir, sum eisini eru mongolar, t.d. Eyðstein og Øssur. Vit eru bestu vinir, segði ein glaður Elvin Weihe, sum sjálvur hevur Down´s Syndrom, tá hann var við í pallborðinum, sum Javna skipaði fyri mánakvøldið. Sosialurin var við til fundin**

DOWN'S SYNDROM
*Eydna Skaale*

Mánakvøldið 15. mars setti felagið Javni hol á orðaskiftið um fosturvatnskanningarnar, sum nú verða bodnar øllum kvinnum. Á Hotel Hafnia varð pallborðsfundur og orðaskifti um málið. Við pallborðið sótu Hans Pauli Strøm, landstýrismaður, Pál Weihe, lækni, Elvin Weihe, sum sjálvur hevur Down's Syndrom og Anna Maria Joensen, sum eigur eina dóttur við Down's Syndrom. Felagið reisti serliga tríggjar spurningar:

*-Kunnu vit forða fosturvatnskanningum?*
*-Skal nakað mark setast í málinum?*
*-Um ja, hvar skal markið tá setast?*

**Málið í stuttum**
Í Danmark kom í 1994 ein leiðbeining til allar læknar, sum virka undir danska "sundhedstyrelsen". Í hesi leiðbeining stendur, at allar kvinnur, ið eru 35 ár og eldri skulu fáa tilboð um fosturvatnskanning, um tær gerast við barn. Hetta verður gjørt fyri at kanna, um fostrið hevur ávís brek, t.d. um tað hevur Downs Syndrom (mongolismu).

Kanningin verður gjørd á tann hátt, at farið verður inn í lívmóðurina við eini nál, og so verður roynd tikin av fosturvatninum. Kyknurnar verða so dyrkaðar í eina tíð, inntil arvaanleggið sæst. Hetta er ikki heilt vandaleyst, tí møguleiki er fyri, at fostrið fær skaða ella doyr.

At tað bert hava verið kvinnur yvir 35, ið hava fingið tilboð um kanningina er tí, at møguleikin fyri at fostrinum bagir nakað veksur við árunum.

Men nú er so ein broyting komin. Í fjør kom út ein teknisk rapport, gjørd av eini serfrøðinganevnd í Danmark, har mælt verður til at endurskoða leiðbeiningina frá 1994. Nú skal tað standa øllum kvinnum í boði at taka fosturvatnsroyndina, soleiðis, at allar kvinnur fáa møguleika at vita um nakað óvanligt er við barninum, tær bera. Hetta gevur teimum so møguleika at velja fosturtøku, um tær ikki halda seg megna eitt brekað barn, ella at fyrireika seg uppá eitt lív við einum brekaðum barnið.

Endamálið við lógini er ikki at avtaka tey brekaðu, men heldur at kunna kvinnuna um møguleikarnar sum fyriliggja. Dentur verður lagdur á, at tað er kvinnan sjálv, sum skal taka avgerðina hvørt fosturvatnskanningin skal gerast ella ikki. Hon skal hava allar neyðugar og viðkomandi upplýsningar, soleiðis at hon seinni ikki skal angra avgerðina.

**Javni mótmælir**
Men føroyska felagið fyri fólk við breki og avvarandi



*23 ára gamli Elvin Weihe, sum er mongol, sat við pallborðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

hjá hesum, heldur ikki, at henda lógin er serliga góð.

– Vit eru ikki ímóti fosturtøku sum so, men vit eru ímóti, at tað frá samfelagsins síðu er í lagið at taka fostrini, sum hava brek. Tá verður gjørdur munur á, hvørji lív hava virði og hvørji ikki hava. Vit halda, at lívið hjá einum brekaðum barni hevur eins stórt virði, sum lívið hjá einum normalum barni. Hóast vit tosa um tvey ógvuliga ymsik lív, so er virðið á lívunum tað sama. Tí halda vit ikki, at fosturdiagnostikkur er haldgóð grundgeving fyri fosturtøku, sigur Óli Wolles, sum var orðstýrari á fundinum.

**Hevur mítt barn so ikki rætt at liva?**
Anna Maria Joensen, sum sat við pallborðið, var samd við Óla í hesum.

– Hvat billa tey sær inn, at siga, at dóttir mín ikki er nóg góð at liva. Hon er ein gáva, og tað er ikki ein einasti dagur, har eg hevði ynskt mær hana at verið øðrvísi, enn hon er, segði hon m.a. Hon var 21 ár, tá hon átti dóttrina Jonu, ið er mongol.

– Eg skal ikki mála tað ljósareytt at fáa eitt brekað barn, tí tað er hart. Allir dreymar og allir tankar, sum tú hevur gjørt tær meðan tú hevur gingið við barninum, fara í vaskið. Men so lærir tú at liva við tí. Tú lærir at hugsa øðrvísið um tingini. Óansæð um barnið er brekað, so er tað framvegis eitt lítið barn, sum hevur brúk fyri mær. Eg trúgvi, at har Gud steingir eina hurð, letur Hann eitt vindeygað upp. Sjálvt um lívið gerst øðrvísi enn tú av fyrstan tíð hugsaði tær, nýtist tað ikki neyðvendigvís at gerast verri, sigur Anna Maria.

Hon heldur ikki, at fosturvatnskanningarnar fara at gera valið hjá ungum mammum lættari, tvørturímóti. Hon vísir á, at tað eru nógvar kvinnur, sum í dag hava tørv á sálarligari hjálp, tí tær hava valt at fáa fosturtøku. Og velja tær at hava barnið, sjálvt um brek er staðfest, so verða tað nakrir langir mánar at ganga við búki, fullir av ótta og stúran.

– Eg má siga fyri meg, at eg eri ógvuliga glað um, at eg ikki visti um brekið hjá Jonu. Tað hevði gjørt alt nógv truplari, sigur hon.

**Verjið korallrivini**
Anna Maria fíltist á grundgevingarnar fyri at taka brekað børn úr móðurlívi.

– Familjan skal ikki hava óneyðugt stríð, siga tey. Men hvat er óneyðugt stríð og hvør kann verja seg fyri tí? Hvat um barnið gerst heilaskatt undir føðingini ella seinni í lívinum verður yvirkoyrt og fær brek av tí?

Hon staðfestir, at tað eru so mong, sum eru verri fyri enn hon, hóast hon hevur eina gentu, sum er mongol.

– Tað eru so nógvar sjúkur til, sum gera lívið svárt og tungt. Eg havi í øllum førum altíð mína lítlu, glaðu sólstrálu at gera meg glaða.

Hon fílist á, at so nógv verður sett í verk fyri at verja alt millum himmal og jørð, men at so lítið verður gjørt fyri at verja tey brekaðu.

– Verjið korallrivini, verjið náttúruna.. Hví hugsar eingin um at verja lívið á børnunum? Á dóttir míni og hennara líkum? Tað kundi verið so lætt at sett samfelagslig tiltøk í verk, fyri at bøtt um støðuna. Hetta hevði uttan iva gjørt tað lættari hjá ungum mammum at havt brekað børn, segði hon.

**Eg elski at vera mongol!**
Á fundinum vórðu bæði fyrimunir og vansar við fosturvatnskanningini nevndir. Men ein, ið ikki helt málið verða so innviklað, sum tað varð gjørt til, var 23 ára gamli Elvin Weihe, sum er mongol. Hann sat eisini við pallborðið, og hevði ein ógvuliga greiðan boðskap.

– At vera mongol er bæði gott og ringt. Onkuntíð er tað keðiligt, tí smádreingir kalla meg mongol. Men so sigi eg við teir, at teir vita ikki hvat tað er, greiddi Elvin frá.

Hann segði frá um frítíðarítriv, m.a. at honum dámar væl ítrótt og at hann elskar at svimja. Hann býr á einum sambýli og hevur akkurát verið í praktikk.

– Eg elski at vera mongol, tí teir eru so fittir. Eg havi nógvar góðar vinir, sum eisini eru mongolar, t.d. Eyðstein og Øssur. Vit eru bestu vinir, segði hann glaður.

Hann hevur stórar framtíðarætlanir, m.a. ætlar hann sær at flyta til Havnar, og arbeiða á onkrum vardum verkstaði.

– Nú ætla tey at fjerna okkum. Hví skulu tey tað? Eg haldi, at tað er óneyðugt at fjerna mongolar, segði hann. – Og hví skulu tey bestemma yvir okkum?

Hann endaði innleggið við at siga sína innastu meining um tey, ið hava gjørt lógaruppskotið, og sum ætla at tálma talið av fólki við breki.

– Eg haldi, tey eru langt úti, um tey fara at fjerna okkum, staðfesti hann, áðrenn lógvabrestirnir skolaðu móti honum.

Pál Weihe, lækni:

# Hetta krevur nógv av læknunum

DOWN´S SYNDROM
*Eydna Skaale*

– Vit mugu gera okkum púra greitt, hvat tað er vit ætla okkum við hesum kanningunum. Skulu tær gerast, sum ført hevur verið fram, fyri at útrudda fólk, ið bera brek ella er meiningin at geva foreldrunum sjálvum møguleikan at fáa kunning um sítt ófødda barn? Hetta var nakað av tí, sum Pál Weihe lækni, aftur og aftur legði áherðslu á á pallborðsfundinum hjá Javna mánakvøldið.

**Vit kunnu ikki nokta**
Onkur vildi vita, um ikki vit kunnu sýta fyri at gera hesar royndirnar. Pál Weihe vísti tá á, at tøknin er komin so langt og heimurin er vorðin so lítil í seinastuni. Um vit nokta at fylgja leiðbeiningini her á landi, kunnu kvinnur bara fara til eitt hvørt annað land, har kanningin er loyvd.

Men tað er ikki so lætt bara at nokta at fylgja leiðbeiningini frá Sundhedsstyrelsen í Keypmannahavn. Har verða lógir og reglugerðir viðtiknar og broyttar. Síðani verða boð givin til serlig autoriserað fólk, í Føroyum er tað t.d. landslæknin. Hann skal so syrgja fyri at fáa øllum virkandi læknum í Føroyum boðini úr Keypmannahavn.

– Hetta er fyri at tryggja, at allir læknar bera seg at á ein ávísan hátt. Eg kann ikki bara fara at finna uppá ein nýggjan viðgerðarhátt, sum eg fari undir at nýta, tí so verður einki skil á. Henda skipan tryggjar, at allir borgarar fáa somu viðgerð, óansæð hvar í ríkinum teir búgva og óansæð hvør lækni teirra er, sigur Pál Weihe.

**Stór læknalig avbjóðing**
Men hvussu kunnu vit tryggja, at tað verður 100% neutral læknalig informatión, sum ungu kvinnurnar fara at fáa?

– Í einum slíkum máli er tað ógjørligt ikki at gera sær eina meting sjálvur um hvat er rætt og skeivt. Tá tú skalt kunna fólk, mást tú vita alt sum er vert at vita um málið, og tá tú gert tað,

*Framhald á næstu síðu*